# Haldið Sosialin!

400,- kr. um ársfjórðingin

- sparið 380,- kr.
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn:

Bústaður:

Postnr.:

Bygd/býur:

Telefon nr.:

Undirskrift:

Ókeypis
Verður sent óþostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Sosialurin




listastevna føroya arts festival

# Klæðir í Pakkhúsinum

## Í hesum døgum hýsir Müllers Pakkhús einari klædnaframsýning





LISTASTEVNA
*Tekstur: Rúnar Reistrup*
*Myndir: Maria Olsen*

Hósdagin læt framsýningin av klædnasniðum hjá Elisu Heinesen upp í Müllers Pakkhúsi í Havn. Nógv fólk vóru komin í Pakkhúsið hendan seinnapartin fyri at síggja hvat 29 ára gamli føroyski sniðgevin, sum býr og arbeiðir í London, hevði at sýna fram.

Eftir framsýningina vórðu klæðini hongd upp, soleiðis at fólk fáa høvi at síggja tey nærri komandi dagarnar. Framsýningin er opin hvønn dag millum kl. 14 og 18 heilt til Listastevnan endar 17. august.

Atgongumerki til framsýningina kosta 40 krónur.

# Stórur evnisdagur um parkinsonsjúkuna

TÍÐINDASKRIV
*Nevndin fyri parkinsonfelagið*

Í samband við „Ár teirr brekaðu", skipar Parkinsonfelagið fyri evnisdegi mikudagin 20. august.

Felagið hevur fingið navnframa yvirlæknan, Erik Dupont, sum er serlækni í parkinsonsjúku, at koma henda vegin. Saman við honum er Vivi Dupont, sjúkrarøktarfrøðingur, sum hevur specialisera seg innan parkinsonsjúkuna.

Erik Dupont hevur verið yvirlækni á neurologiskari deild á Århus kommunehospital síðan 1980.

Vivi Dupont starvast sum ráðgevi hjá danska parkinsonfelagnum.

Endamálið við evnisdegnum er at virka fyri, at sjúklingar kunnu fáa betri liviumstøður og røktarstarvsfólk størri vitan um sjúkuna.

Tað er av sera stórum týdningi at eisini avvarðandi fáa henda kunnleika og felagið vónar stóra undirtøku. Tey trý sjúkrahúsini og øll ellis- og røktarheim, hava fingið tilboð um at luttaka á evnisdegnum. Tilmelding fer fram hjá Hildebjørg Weihe, á telefon: 31 38 97.

Parkinsonfelagið hevur umleið 140 limir. Bert ein neurologur er til hesar 140 limir, sum búgva bæði á meginøkinum og úti um landið annars.

Dagurin verður skipaður soleiðis, at til tey ymsu evnini verður høvi at seta spurningar og skifta orð. Stórur tørvur er á servitan um hesa sjúkuna, og seinastu árini hevur verið granskað nógv í viðgerðarháttum og møguleikum.

### Drúgvar royndir

Fyrilestrahaldararnir hava bæði hollan førleika og drúgvar royndir. Erik Dupont hevur m.a. verið limur í "Dansk parkinsonforeningens Forskiningsråd" síðan 1985, limur í "Medical Advisory Board of European parkinson´s Disease Assosiation" frá 1997, formaður fyri Dansk Selskab for bevægelsesforstyrrelser og limur í "Movement Disorder Society" síðan 1993.

Harumframt hevur Erik Dupont skrivað eina røð av greinum í smárit og tíðarrit. Hann hevur nýtt nógva tíð at granska, og fekk Filtenborg-Prisen í 1998, sum er 100.000 kr.

Vivi Dupont hevur m.a. starvast á neurokirurgiskari deild í Århus, sum deildarsjúkrarøktarfrøðingur í Bagdad, og verið viceforstandari á sjúkrahúsi í Saudiarabien.

Hon undirvísir um sjúkuna og hevur skrivað eina røð av greinum í smárit og tíðarrit. Harumframt hevur hon tikið lut í nógvum ráðstevnum á altjóða støði.

### Skráin fyri evnisdagin um parkinsonsjúku 20. august 2003 Hotel Hafnia

Erik Dupont, yvirlækni og serlækni í parkinson og Vivi Dupont, sjúkrasystur við servitan um parkinson, standa fyri degnum.

Kl. 09.00 Skráseting, kaffi og morgunbreyð
Kl. 09.30 Vælkomin
Kl. 09.40 Hvat er Parkinsonsjúka - um sjúkuna, eyðkennir, gongd.
Hvussu upplivir sjúklingurin sjúkuna
Kl. 10.30 Steðgur
Kl. 10.50 Medisinsk viðgerð

*Hvussu fært tú mest gagn av heilivágnum ?*
*Spurningar og orðaskifti*
Kl. 12.00 Ábit
Kl. 13.00 Rørslutrupulleikar: Góð hugskot at nýta í gerandisdegnum.
Spurningar og orðaskifti
Kl. 14.00 Steðgur
Kl. 14.30 Trupulleikar at svølgja, kostur, trupulleikar við maganum.
Spurningar og orðaskifti
Kl. 15.15 Steðgur
Kl. 15.30 Skurðviðgerð av Parkinsonsjúku.
Hvussu, - hvør kan skurðviðgerast og hvør kann ikki
Kl. 16.30 Liðugt
Kl. 17.30 Døgurði